


Lív Højsted Horsdal
horsdal@sosialurin.fo

Síðan ár 2002 hevur heilsu- og umhvørvisnevndin á býráðnum saman við skúlunum í Norðoyggjum lagt nógva orku í at sannføra næmingar í 6.- 9. flokki um at halda seg burtur frá at roykja. Hvørt ár skipa tey fyri einum stórum tiltaki fyri allar næmingar, har teir fáa høvi at síggja, hvussu vandamikið, býtt og heilsuskaðiligt tað er at roykja.

## Fjølbroytt skrá

Skráin á árliga tiltakinum 'Roykfríur skúli' var sera fjølbroytt - bæði við álvara og skemti. Og í hølunum á hvørjum øðrum trinu ymisk á pall fyri at greiða teimum um 400 næmingunum frá, hvussu býtt tað er at roykja. - 'Tað loysir seg at kempa fyri at gerast roykfrí/ur', 'Ver sterk/ur og sig nei', 'Eingin framtíð er í tubakki' o.s.fr. ljóðaðu slagorðini.

Serliga hugtóku KÍ venjarin, Tony Paris, og sjónleikarin, Jákup Veyhe, næmingarnar. Tony Paris greiddi frá, at tey, ið roykja, als ikki eru før fyri at kappast ítróttaliga við tey roykfríu, og legði eisini øllum eina við at gerast roykfrí sum skjótast, um tey ætlaðu at gera seg galdandi á ítróttavølli. Jákup Veyhe kom á pall við eini søgu um pápa sín, ið doyði av lungnakrabba, og eisini setti hann skjótt og væl ein lítlan leik upp við nøkrum sjálvbodnum næmingum. Og hetta hildu øll vera ógvuliga stuttligt.

Hvussu var og ikki, so vóru lógvabrestirnir mangir, tá tiltakið var komið at enda, og tað tóktist, eins og næmingar flestir fóru væl hýrdir avstað aftur.

## Skúlarnir í Norðoyggjum skulu verða roykfríir

Rani Nolsøe, formaður í heilsu- og umhvørvisnevndini á býráðnum, sigur, at ætlanin við hesum tiltakinum er í stuttum tann at fáa allar skúlarnar í Norðoyggjum roykfríar:

- Tað skal rætt og slætt ikki bera til hjá nøkrum at roykja á skúlunum. Um ein ikki byrjar at roykja sum ungur, meti eg, ein er nóg búgvin til ongantíð at fara at roykja, og tískil er skúlin tað fullkomna staðið at byrja at gera samfelagið roykfrítt. Hóast tað er sera trupult at spáa um framtíðina, vóna vit, at allir skúlarnir í Norðoyggjum eru fullkomiliga roykfríir í 2015, sigur Rani Nolsøe.

Erik Biskupstøð, lærari á skúlanum á Ziskatrøð, veit at siga, at tað vísir seg, at næmingar byrja at roykja, tá teir koma í framhaldsdeildina:

- Í hesum aldrinum vita tey ungu ikki rættiliga, hvønn veg tey skulu venda. Sjálvsálitið hjá mongum er so sum so, men við at roykja kenna tey seg á ein hátt trygg, tí hetta gera tey vaksnu. Tó er tað sera jaligt, at nýggja løgtingslógin hjálpir okkum so væl soleiðis, at tey ungu hava trupult at fáa fatur á sigarettum.

Erik Biskupstøð heldur, at tey, ið roykja á skúlunum, hóast tey vita, tað er forboðið, áttu at verið revsað á ein ella annan hátt:

- Tað eru altíð nøkur, ið sníkja seg aftan fyri ymisk skot í fríkorterunum at roykja. Trupulleikin í løtuni er tískil tann, at fylgjurnar av hesum ikki eru nóg stórar. Men um vit t.d. høvdu møguleikan at koyrt teir næmingarnar, ið roykja í skúlatíðini, heim í 1-2 dagar, so høvdu øll kanska veruliga sæð, hvussu álvarsmikið tað er at roykja.

Men vita tey ungu nú á døgum ikki av, at tað ikki longur er 'kul' at roykja?

- Jú, tað vita tey, men tá vit bert eru 14 ára gomul, tykist lívið ikki at vera so avbera langt, og tískil hugsa vit tá ikki vanliga um sjúku og forfall, og tað er orsøkin til, at nógv tykjast so líkasæl um henda trupulleikan.

## Góð úrslit

Ætlanin er at hava tiltakið 'Roykfríur skúli' á hvørjum ári fyri at fáa leypandi hagtøl til kanning, ið verður gjørd hvørt ár, og higartil eru fyrireikararnir sera væl nøgdir við úrslitini:

- Hagtølini ganga sanniliga rætta vegin - nógvir næmingar í Norðoyggjum lata vera við at nýta tubbak, og fleiri og fleiri leggja eisini av at roykja. Tað er í høvuðsheitum alneyðugt at fáa skúlarnar roykfríar. Sum vaksin sleppur tú t.d. sjálvdan á fund við eini sigarett í hondini, og nærum øll almenn øki eru roykfrí - so hví skulu skúlarnir ikki endurspegla samfelagið? Leggur Eyðun Nolsøe afturat.

Á tiltakinum heiðraði býráðið teimum flokkunum, ið vóru roykfríir við heiðursbrævi. Tað vóru heilir fimm 6. flokkar og seks 7. flokkar, har eingin roykir, men eingin 8. flokkur megnaði at vinna sær henda heiðurin. Men ein 9. flokkur í skúlanum á Ziskatrøð var, sum tann einasti, enn roykfríur, og hetta eru fyrireikararnir serliga glaðir fyri, og heiðraði býráðið tískil hesum flokki við eini peningagávu á 2.500 kr.